## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig. Seint um kvøldið møguliga regn.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og regn av og á. Seinnapartin minni vindur av suðri og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og um morgunin møguliga regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men sunnudagin upp í stívt andøvsgul av landsynningi og regn. Hitin millum 10 og 14 stig.



# Føroyingar skjóta føroyingar

Eitt nýtt ítriv stendur nú í boðið til allar føroyingar. Eirikur Rasmussen hevur sett á stovn eitt paintballstað inni á Sundi, har fólk kunnu koma at stuttleika sær.

– Eg havi leigað økið frá kommuni í eitt stutt tíðarskeið. Fyrstu tíðina skal eg yvirbevísa kommununa um, at tað er rætt at leiga mær økið til endmálið, sigur Eirikur Rasmussen.

Paintball er ein vælumtóktur sportur. Eirikur sigur, at paintball er 3. størsti extreme-sporturin í heiminum, størri enn eitt nú snowboarding.

Nýggja paintball-staðið byrjaði um vikuskiftið, og tað liggur inni á Sundi. Tað kostar 150 krónur at leiga banan við 100 kúlum, og síðani kunnu kúlur keypast fyri eina krónu stykkið. Aldursmarkið er 18 ár, men tey millum 16 og 18 ár kunnu sleppa framat, um foreldrini loyva tí.

*hkm*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 25 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 26 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 19 |
| New York | 25 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1024 hPa. yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað og viknar. Eitt lágtrýst, 993 hPa. á 48N-33V fer í landnyrðing og grynnist.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani fer um Føroyar hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/06 kl. 06[00]– 08/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 8,8°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 07/06 kl. 06[00]–08/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 40,5 mm




www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

3. juni: Mánin næstur jørðini
9. juni: Seinna kvarter
17. juni: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. juni | 01.02 | 13.27 | 00.02 | 12.27 | 00.17 | 12.42 | 03.02 | 15.27 | 04.02 | 16.27 | 11.42 | — | 10.42 | 23.28 | 01.17 | 13.42 | 02.17 | 14.42 | 00.47 | 13.12 | 02.02 | 14.27 |
| 10. juni | 02.13 | 14.38 | 01.13 | 13.38 | 01.28 | 13.53 | 04.13 | 16.38 | 05.13 | 17.38 | 00.28 | 12.53 | 11.53 | — | 02.28 | 14.53 | 03.28 | 15.53 | 01.58 | 14.23 | 03.13 | 15.38 |
| 11. juni | 02.51 | 15.16 | 01.51 | 14.16 | 02.06 | 14.31 | 04.51 | 17.16 | 05.51 | 18.16 | 01.06 | 13.31 | 00.06 | 12.31 | 03.06 | 15.31 | 04.06 | 16.31 | 02.36 | 15.01 | 03.51 | 16.16 |
| 12. juni | 03.32 | 15.57 | 02.32 | 14.57 | 02.47 | 15.12 | 05.32 | 17.57 | 06.32 | 18.57 | 01.47 | 14.12 | 00.47 | 13.12 | 03.47 | 16.12 | 04.47 | 17.12 | 03.17 | 15.42 | 04.32 | 16.57 |

5 707265 100036